

www.oljan.fo

**Jan Müller** 12 - 12 - 2011

# Danir kundu átt stóran oljugrunn

Høvdu danir sett teir almennu pengarnar frá oljuvinnuni í ein grunn, eins og norðmenn hava gjørt, høvdu 307 milliardir krónur staðið í tí danska oljugrunninum í dag. Tað vísa útrokningar hjá Ugebrevet A4, sum samstundis staðfestir, at sambært Sovereign Wealth Fund Institute hevði grunnurin verið tann 10. størsti í heiminum av sínum slagi. Jørgen Birk Mortensen, sum er professari á lærda háskúlanum í Keypmannahavn, sigur, at búskaparliga hevði Danmark verið væl betur fyri, um politikararnir tá høvdu valt at stovna ein oljugrunn. Professarin sigur, at høvdu oljupengarnir úr Norðsjónum staðið í einum grunni, hevði tann almenna nýtslan ikki vaksið so nógv, sum hon hevur gjørt, og skattalættarnir høvdu verið minni. Lars Andersen, sum er stjóri í Arbejderbevægelsens Erhvervsråd, saknar eisini oljugrunnin, sum eitt nú kundi verið brúktur til íløgur í gransking og útbúgving, heldur hann. Tað var serliga í 2003-04, at pengar frá oljuni í Norðsjónum runnu niður í danska ríkiskassan, men teir borgarligu flokkarnir, sum hava stýrt landinum síðani, iðra seg ikki um, at pengarnir eru brúktir. Bæði Vinstri og Tey Konservativu siga, at oljupengarnir hava gjørt stórt samfelagsligt gagn, og at tað var ikki skeivt at brúka teir. Hyggja vit so eftir gongdini í hinum pørtunum av Ríkisfelagsskapinum, sum tó enn ikki hava funnið olju ella gass, so eru her longur settir olju- og búskapargrunnar á stovn, longu áðrenn kolvetni eru funnin.